tíðindablaðið **sosialurin**

Postsmoga 76,
3800 Argir,
telefon 11820

Útgevari: p/f sosialurin
Fyritaksstjóri og blaðstjóri: Tórfinn Smith (ábyrgd)
Blaðfólk: Høgni Djurhuus, Dagny Joensen, Jóhann Mortensen og Jan Müller
Lýsingar: Árni Joensen
Uppseting: p/f sosialurin. Prent: p/f pressan 1981

Tingsetan endað — borgarligu málini rokkin (!?)

oddagrein

TINGSETAN er av og tingmenn sendir til hús. Longsta og mest hurlivasakenda tingseta í løgtingsins søgu er at enda komin.

HENDA tingseta hevur, øll sum hon er, verið eitt skúladømi um borgarligan politikk, soleiðis sum hann virkar í Føroyum.

KLANDUR og stríð, atgerðarloysi, vina- og kenningarpolitikkur, maktaloysi, uppgávulyndi og eirindaleysur eginkærleiki er tann mynd, ið stendur eftir av fyrsta borgarliga alternativi í mong ár.

BERT EITT hevur semja verið um, og tað hevur verið ikki at leggja frá sær — ikki at sleppa javnaðarflokkinum framat. Annars hava teir kappast um at stinga hvønn annan í bakið við at fella mál hvør hjá øðrum, ella við at umkalfatra og avskepla málini, so at landsstýrismenninir ikki hava kent síni egnu mál aftur, tá ið tey eru komin á tingbord.

HETTA man vera tann meting almenningurin hevur av borgarliga alternativinum aftan á 3 ár við maktini.

Hvussu meta teir sjálvir?
Latið okkum hyggja at málgøgnum teirra, hvat tey siga:

»MÁLINI ERU ROKKIN«, kunnger stavnamaður samgongunnar í Dagmaðnum — Dimma skrivar um veðrið!

Hvørji eru so hesi mál?

JÚ, VIÐ hækkaðum gjøldum og nógv hækkaðum skatti hevur samgongan aftur eina ferð sett **realløninа** hjá løntakarum niður — eini 10% í hesari tingsetu og eini 20—30% síðan hon tók við.

ONNUR ROKKIN mál: **forsorgarlógin er so mishandlað, at hon lítlan og ongan bata ger, t.d. verður nú ikki møguligt hjá einum arbeiðsleysum at fáa forsorgarhjálp, og er tann arbeiðsleysi tískil fullkomuliga sleptur upp á fjall og Harrin má vita, hvat hann og hansara skulu liva av, tá ið uppiløgurnar koma.**

FLEIRI ROKKIN MÁL: **Heimahjálpin er skorin niður, soleiðis at heilt nógv nú fáa noktað hesa almennu tænastu; onnur skulu til at gjalda fyri hana í dýrar dómar. Frítíðarlógin er eftir boðum frá afturhaldskroppum so skamfarin, at lítið og einki gott er eftir í henni, um yvirhøvur nakar dugur er í henni, fara vit at fáa at síggja í vetur.**

OG UPPAFTUR ONNUR ROKKIN MÁL: **Røktarheimið** í Havn hevur fingið mønustingin, **skattavaldið** latið uppí hendurnar á bankum og peningastovnum, so hesir fara at fáa uppaftur meira á tí einstaka føroyinginum, enn teir hava frammanundan. Og víðari: **siglingarmálið** seinkað og amputerað, **svartkjaftavinnan** forklutrað og lutvíst korrumperað, so vina- og kenningarpolitikkurin er komin í áður ókendar hæddir. Endurnýggan av **skipaflotanum** vavd upp í ein ellubita, rækjuveiðan við **Svaldbard** lutvíst forkomin, **laksaveiðan** óneyðuga nógv niðurskorin, og útlendingar hava fingið størri rættindi á Føroyaleiðum enn føroyingar.

AT ENDA kunnu vit aftur at hesum fáu og hissini útvaldu mongu stórmálum nevna hjartamál løgmans og sambandsflokksins **uttanlandsskuldina**. Hesa skuld hava teir nú fingið upp ímóti 2 milliardum, so ein skilir væl, at teir alternativu eru ernir, og at Dagblaðið við sigursælari rødd kunnger at málini eru rokkin — og at Dimma skrivar um veðrið í síni seinastu oddagrein í hesari tingsetu!

Tað loysir seg at lesa **sosialin**

Friðarrørsla og hervald

Randi Jacobsen hevur ein stubba í Sosialinum 31. mai við yvirskriftini »Friðarrørsla fyri hervaldi?« Hon heldur, at blaðið man hava misskilt okkurt í samrøðuni við undirritaða um støðuna, sum »Fólk fyri Friði« hevur til NATO.

Fyrst hetta: Blaðið er komið við eini rættleiðing um samrøðuna.

Friðarrørslan

Í øðrum lagi man Randi vita frá tiðini, tá ið talan var um at stovna hesa friðarrørslu, at tá varð gjørt greitt, at hon mátti liggja á einum øðrum og hægri støði enn bara ein NATO-andstøða.

Ætlanin við friðarrørsluni er at virka móti tí **ræðuligu kjarnorkuvápnadubbing, sum fer fram og fyri friði.**

Tað, sum vit hava lagt høvuðsdentin á, er: at vekja ans millum fólk fyri, at heimurin er komin í eitt slíkt óføri vegna atomvápnadubbingina, at tað slepst ikki burtur úr aftur hesum, um ikki tey smáu og smærru londini gera vart við ørskapin og royna at koma við uppskoti til nýggjar loysnir. Atomvápnaveldini hava enn onga loysn funnið uttan hana, at eftir hvønn sokallaðan »friðarfund« dubba tey meira enn nakrantíð.

»Fólk fyri friði« er, hóast rørslan enn er ung, komin fram við einum positivum uppskoti saman við líknandi rørslum í hinum Norðanlondunum, einum uppskoti, sum má haldast vera soleiðis, at øll fólk uttan mun til politiska ella religiøsa ella aðra áskoðan eiga at taka undir við.


Uppskotið um kjarnorkuvápnafrí Norðurlond og ta nýhugsan, sum harav stendst, hava landsstýris- og løgtingsmenn fingið.

»Fólk fyri Friði« er rørsla í so víðum støði, at allir føroyingar eiga at kunna stuðla hana.

Um herstøðir í Føroyum

Tað er almannakunnugt, at Føroya løgting hevur tvær ferðir samtykt, at herstøðir ikki skulu finnast her á landi. Kortini er í hvussu er ein. Bólkar og einstaklingar hava mótmælt støðini á Sornfelli, men einki rokist fyri, at hon verður tikin niður. Harafturímóti hava fólk, tykist tað, vant seg til tað, sum verður hevdað, at hetta er ein ávaringarstøð og ein stød sum tænir »civilum« endamáli.

Tá ið »Fólk fyri Friði«



gekk friðargongu niðan í Mjørkadal annan hvítusunnudag og hevði fólkafund har, tá var tað ikki at mótmæla verandi støð sum so, men eitt mótmæli móti tí, sum er ætlað at koma. Um Randi og onnur bara fegnast um hetta tiltak, tí »nú var umstíðir komið lív aftur í NATO-andstøðuna, og tí høvdu vit leingi bíðað eftir«, so heldur hon ikki tað, sum friðarrørslan kundi føra fram, og tað, sum einstaklingar førdu fram, hvørt frá øðrum.

Eg taki uppaftur. Mótmælið frá friðarrørsluni var og eigur at verða ímóti eini útbygging (nýgerð!), sum møguliga fær útgerð og útbúnað, sum kann nýtast í einum kjarnorkuvápnakríggi. Og tá hava vit, um vit ikki gera alt fyri at forða eini slíkari útbygging, verið við til at økja um krigsvandan. Hetta er rætt og slætt støðan, vit eru komin í, ein støða við stórari ábyrgd.

Og hvat gjørdu føroyingar so við hesa ábyrgd? »Jú teir selja grýn!« Figgjarnevndin hjá býráðnum átti at vist umsóknini um bygging frá sær, til hon hevði fingið nágreiniliga at vita, hvat slag av útgerð talan var um. Tað hendi ikki, men tað, sum hendir, er, at grivið verður út í Mjørkadali og byrjað at byggja, áðrenn býráðsfundurin er, sum skal taka støðu í hesum máli. Slíkt er virðing fyri føroyskum myndugleikum!

Vit vóna, at alt ikki er sagt í hesum álvarsmáli, men at landsstýri og løgting gera vart við seg, so at Føroyar ikki gerast eitt »kommandotarn« í einum møguligum kjarnorkuvápnakríggi. Einki fremmant vald eigur í slíkum spurningi at sleppa at stinga fingurin í øskuna fyri okkum.

Kjartan Mørkøre

Farið ikki úr F.A.!

Eg fari at biðja arbeiðsfólk í Fuglafirði um at hugsa seg væl um og ikki fara burtur úr Føroya Arbeiðarafelag, soleiðis sum nú ljóðar í bløðunum.

Feløgini í Fuglafirði eru millum tey størstu í F.A. og fara tey úr, so verður F.A. veikari.


Tann skriving, sum hevur verið, er ósømandi og óhóskandi. Og eitt er vist: fuglfirðingar fáa ikki betri formann enn Símun Abrahamsen. Hann hevur gjørt nógv gott fyri arbeiðsfólkið í Fuglafirði.

Tað er ongin grund at øsa seg upp um valið á aðalfundinum hjá F.A. Tað verður nevndarval aftur og tá kunna fuglfirðingar fáa mannin inn aftur.

Men, eina ferð afturat, eg biðji tykkum, fuglfirðingar: hugsið tykkum væl um, áðrenn tit avgera at fara úr Føroya Arbeiðarafelag! Tí tað má ikki henda.

Gamal fakfelagsmaður á bygd

Tit ringja — vit skriva



Ringið telefon
11820